## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landnyrðingi og norði og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði, seinni minni vindur av útnyrðingi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.

# Føroyskur oljumaður skrivar oljuskaldsøgu

**BØKUR**
*Jan Müller*

Tað er ikki hvønn dag, at nýggj føroysk skaldsøga verður givin út. Og enn sjáldsamari er, at slík skaldsøga tekur upp eitt so háaktuelt evni sum oljuleiting og føroysk oljuvinna. Tað er so heldur ikki ein og hvør, sum skrivar. Hann man vera ein tann føroyingurin, sum hevur arbeitt longst í altjóða oljuvinnu og hevur røkt týðandi ábyrgdarstørv í hesi vinnu. Rithøvundin og oljumaðuin er klaksvíkingur og er í løtuni búsitandi í Qatar, har hann starvast innan oljuvinnu fyri Maersk. Maðurin eitur Jóannes Kjølbro, uppvaksin í Klaksvík, tók studentsprógv í Havn og prógv sum sivilverkfrøðingur/HD í Danmark. Hann hevur arbeitt hjá danska oljufelagnum Maersk í mong ár.

Nú hevur hann so greitt úr hondum eina skaldsøgu, sum ber heitið: »Meðan sólin í eystri roðar«. Skaldsøgan umrøður eitt fyri okkum føroyingar aktuelt mál, oljuleiting og loyvi til slíka leiting.

– Hvør stýrir leikinum, tá loyvi verða givin at leita eftir olju í Føroyum er áhugaverdi spurningurin, sum verður reistur í bókini. Á baksíðuni fáa vit so eisini at vita, at eitt altjóða oljufelag, sum ikki fekk nakað leitingarloyvi, tá seinasta útbjóðingarumfar var fyri, ger av at senda ein umboðsmann til Føroya fyri at fáa greiðu á, hvørjar orsøkirnar munnu vera til, at teir ikki sluppu upp í part.

Umboðsmaðurin er ein føroyskur oljuverkfrøðingur, sum ikki hevur verið heima á klettunum í áravís. Hann kemur í fyrstani ongan veg við kanningum sínum, ikki fyrr enn hann fær samband aftur við familju sína í Føroyum, kemur gongd á. Skjótt er hann mitt í einum melduri av hendingum, har familja, samkoman, fullveldi og almenna umsitingin eru leikarar.

Tá ein breti, ið hevur samband við oljuvinnuna í Føroyum, verður myrdur, gerst greitt, at duldar kreftir standa aftanfyri…Ikki kann sigast annað enn, at timingin fyri útgávuni er góð. 2. útbjóðing til oljuleiting við Føroyar letur aftur 17. november.

Í bókini verður tó gjørt vart við, at innihaldið í skaldsøguni avmyndar ikki nakrar veruligar persónar, feløg, virki ella sotvnar. Um nøkur líkheit finst, er hon tilvildarlig og óætlað sigur rithøvundin. Bókin er prentað hjá Føroyaprent. Hon er 175 blaðsíður.




### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 15 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 13 |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 9 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 32 |
| Athen | 22 |
| Malta | 22 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 23 |
| New York | 21 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 18 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 970 hPa. við Føroyar fer spakuliga í landsynning og grynnist. Eitt hátrýst, 1033 hPa. eystan fyri New Foundland fer í landnyrðing eystan og mennist.




Lágtrýstið sunnan fyri Hetland fer spakuliga eystureftir og grynnist framvegis. Hátrýstið yvir Atlantshavinum stendur mestsum í stað og ein hátrýstryggur til Grønlandsfjørðin fer eystureftir og verður væntandi yvir Føroyum hóskvøldið.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 04/10 kl. 06[00]–05/10. 06[00]. Hitin í gjár: 7,5°
Minsti hiti máldur í oktt.: ÷4,0° - Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 18,0 mm – mált frá 04/10 kl. 06[00]–05/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 41,0 mm

## TIPS 12 úrslit
**Vika 40 – 3. oktober**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | AaB–Silkeborg | **1** |
| 2. | Brøndby–Randers FC | **1** |
| 3. | Esbjerg–AGF | **2** |
| 4. | FC Midtjyll.–FC Nordsjæll. | **X** |
| 5. | OB–Viborg | **2** |
| 6. | AB–Brønshøj | **X** |
| 7. | AC Horsens–Nykøbing F All | **1** |
| 8. | B 93–Dalum | **1** |
| 9. | FC Fredericia–Frem | **1** |
| 10. | Køge–Fremad Amager | **X** |
| 11. | SønderjyskE–Skjold | **1** |
| 12. | Ølstykke–Vejle | **2** |

**Prognosa:**
12 røtt: **212.416,- kr.**
11 røtt: **2.477,- kr.**
10 røtt: **235,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

5. okt.: Mánin longst frá jørðini
6. okt.: Seinna kvarter
14. okt.: Tendring
17. okt.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. okt | 01.03 | 13.40 | 00.03 | 12.40 | 00.18 | 12.55 | 03.03 | 15.40 | 04.03 | 16.40 | 11.55 | — | 10.55 | 23.31 | 01.18 | 13.55 | 02.18 | 14.55 | 00.48 | 13.25 | 02.03 | 14.40 |
| 7. okt | 02.16 | 14.53 | 01.16 | 13.53 | 01.31 | 14.08 | 04.16 | 16.53 | 05.16 | 17.53 | 00.31 | 13.08 | — | 12.08 | 02.31 | 15.08 | 03.31 | 16.08 | 02.01 | 14.38 | 03.16 | 15.53 |
| 8. okt | 03.15 | 15.38 | 02.15 | 14.38 | 02.30 | 14.53 | 05.15 | 17.38 | 06.15 | 18.38 | 01.30 | 13.53 | 00.30 | 12.53 | 03.30 | 15.53 | 04.30 | 16.53 | 03.00 | 15.23 | 04.15 | 16.38 |
| 9. okt | 04.00 | 16.22 | 03.00 | 15.22 | 03.15 | 15.37 | 06.00 | 18.22 | 07.00 | 19.22 | 02.15 | 14.37 | 01.15 | 13.37 | 04.15 | 16.37 | 05.15 | 17.37 | 03.45 | 16.07 | 05.00 | 17.22 |

5 707265 100029 >